# John Arni Nilssen er nú altjóða meistari

**Skopuningurin John Arni Nilssen hevur í talvkapping í Prag tryggjað sær sín triðja og avgerandi IM-norm. Hetta førir við sær, at hann nú hevur fingið heitið altjóða meistari(IM)**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*
*carl_eli@hotmail.com*



*Triði IM-normurin varð fingin til høldar fríggjadagin, og nú er kann John Arni Nilssen seta sær IM framman fyri navnið*

Í 9. umfari fríggjadagin skuldi føroyski telvarin hava javnleik, um málið skuldi røkkast. Telvarin, sum hann kappaðist ímóti, lá væl fyri í kappingini, og tí tók hesin av, tá John Arni tíðliga í talvinum beyð honum remis. John Arni vann kappingina saman við fýra øðrum telvarum. Teir fingu allir 7,5 stig av 11 møguligum. So kappingin má sigast at hava verið ein fullkomin succes hjá John Arna.

Umframt kravið um tríggjar IM-normar, verður eisini kravt, at telvari skal hava havt í minsta lagið 2400 í altjóða rating. John Arni hevur í løtuni 2356, men fyri tveimum árum síðani var hann oman fyri 2400, og tí verður hann útnevndur altjóða meistari, tá nevndin, sum hevur við hetta at gera, kemur saman tíðliga í vár.

Fyrsti normurin hjá John Arna kom í Politiken Cup 2002, tann næsti í røðini í kapping í Budapest2003 og við úrslitinum í Prag er røðin fullfíggjað.

John Arni hevur síðani fyrst í 90´unum verið partur av føroyski talvelituni og í skjótt fleiri ár hevur hann verið sterkasti telvari í Føroyum. Tað eru mong sum halda, at John Arni í fleiri ár hevur havt IM-styrki, ella enntá sterkari enn flestu IM´arar, og tí er feska heitið sera uppiborið. Vónandi kann John Arni vera íblástur til allar hinar føroysku IM-aspirantarnar.

Undan John Arna er tað bert John Rødgaard her á landi, sum ber heitið altjóða meistari. Flóvin Tór Næs hevur somuleiðis ognað sær tríggjar IM-normar, men í løtuni er altjóða ratingtalið hjá honum ov lágt (2291) og hann hevur heldur ikki verið omanfyri 2400.

KÍF-Neistin 35-20 (17-10):

# Sorl í Hoyvík

**Kollfirðingar vunnu leikandi lættan stórsigur, tá teir sunnudagin tókust við Neistan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fleiri høvdu annars roknað við, at Neistin júst í hesum dystinum fór at bíta frá sær, eftir at teir fyri viku síðani spældu ein fínan dyst móti VÍF.

Kollfirðingar hava hinvegin eisini havt batnandi avrik seinastu tíðina, og tað stóð eisini skjótt greitt, at teir ikki vóru sinnaðir at geva Neistanum nakað.

Fyrsta korterið gekk so hampuliga javnt á, men tá KÍF so skrykti seg leyst, var tað ikki við mýkindum. Undan steðginum var munurin vaksin til sjey mál, og so gekk bara ein vegin. Munurin vaks við flúgvandi ferð, soleiðis at bláu havnarmenninir at enda bara bíðaðu eftir, nær hallarfloytan fór at ljóða. Men áðrenn hon gjørdi tað, stóð 35-20 á talvuni.

Fyri sjálva kappingina mundi úrslitið ikki hava tað heilt stóra uppá seg. Men tað staðfesti meira ella minni raðfylgjuna í botninum av talvuni. Tað man í øllum førum vera sera illa hugsandi, at Neistin skal vinna fimm stig afturat, so teir kunnu koma ájavnt kollfirðingunum. Eins og tað eisini er trupult at ímynda sær, at KÍF skal gera somikið nógv um seg, at teir kunnu klintra enn eitt pláss uppeftir.

### FAKTA UM DYSTIN

**KÍF-Neistin 35-20 (17-10):**
**Málskjúttar**
**KÍF:** Arnbjørn Hansen 10(4), Petur Martin Poulsen 8, Rógvi Weyhe 4, Damir Oros 4, Gert Hansen 3, Mirko Milenkovic 2, Karl Jóhan Djurhuus 2, Teitur Joensen 1, Sune Davidsen 1
**Neistin:** Tróndur Kragesteen 6(1), Karl Herup Olsen 3, Jóan P. Holm 3, Johan Brekkstein 2, Karl Oddmar Rasmussen 2, Jens Mohr 1(1), Blagoje Buha 1, Birgir Poulsen 1, Kári Horn 1
**Brotskøst:** KÍF 5, Neistin 5
**Útvísingar:** KÍF 4, Neistin 3
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

# 80 borðtennis luttakarar

**Leygardagin varð 4. Grand Prix umfar avgreitt í Eysturskúlanum í Havn. Talið av luttakarum lá um 80, sum var ein blandingur av gentum og dreingjum, tó mest dreingir**

BORÐTENNIS
*tíðindaskriv*

Kappast var í tveimum, har teir fyrstu 6 bólkarnir byrjaðu kl. 10.00 og hinir 5 byrjaðu kl. 13.00. Leikarar úr Tór og TBF vunnu 10 bólkar, 5 í part, meðan Árnfríður Olsen, sum leikar við nýggja felagnum úr Hvalba, vann K bólkin.

Í fleiri deildum vísir stigatalvan seg at síggja rættuliga spennandi út, undan 5. og seinasta umfari, sum verður avgreitt í næsta mánað. Hjá smápinkunum kunnu enn 4 gentur enda á øðrum plássið, meðan Anna Mikkjalsdóttur liggur á einum tryggum fyrstaplássi. Hjá smápiltunum sær alt út til at verða avgreitt, við Hans Jón Jacobsen sum vinnara, Eyðfinni Jensen sum nr. 2 og David Mortensen sum nr. 3. Í piltadeildini er eisini spenningur í, har Rasmus Potts og Heini Mortensen kappast um gulli og Mattias Mortensen og Patrikk Johannesen um bronsuna. Í smádreingjadeildini er støðan tann sama sum hjá piltunum, har Fróði Jensen og Gilli Sørensen kappast um oddasessin, og Hugin Albinus og Jákup Thomasen um annaðplássi. Í meistaradeildini minkaði spenningurin eftir dagsins umfar, eftir at Fríði Jensen bert kláraði eitt 4. pláss, meðan hansara nærmasti kappingarneyti Petur Niclasen, vann bólkin, og sostatt gjørdist munurin teirra millum heili 50 stig. Um Fríði ætlar at gera sær nakra vón um at fáa gull í Grand Prix kappingini í ár, so skal hann vinna næsta umfar, og síðani vóna at Petur endar á einum 4. plássi. Men alt hetta og meira aftrat, fáa vit at vita eftir 5. umfar, sum verður avgreitt í Havn 25. februar.

**Bólkavinnararnir gjørdist:**
A Petur Niclasen, Tór
B Eyðun Luid, Tór
C Gilli Sørensen, TBF
D Páll Heri Nolsøe, TBF
E Jens Andreas Henriksen, Tór
F Patrikk Johannesen, TBF
G Bjarki Olsen, Tór
H Margeir Kjærbo, TBF
I Birita Mortensen, TBF
J Andrias á Roykheyggji, Tór
K Árnfríður Olsen, Royn

**Støðan eftir 4. umfar:**

**Smápinkur:**
1 Anna Mikkjalsdóttur, TBF - 242 stig
2 Eva Wilhelm, TBF - 194 stig
3 Lív Øster, TBF - 192 stig
3 Sofía Maria Ferjá, TBF - 192 stig

**Smápiltar:**
1 Hans Jón Jacobsen, TBF- 240 stig
2 Eyðfinnur Jensen, TBF - 210 stig
3 David Mortensen, TBF - 168 stig

**Pinkur:**
1 Marin Brattalíð, TBF - 268
2 Birita Mortensen, TBF - 256 stig
3 Femja Mortensen, TBF - 252 stig

**Piltar:**
1 Rasmus Potts, TBF - 690 stig
2 Heini Mortensen, TBF - 590 stig
3 Mattias Mortensen, TBF - 430 stig

**Smágentur:**
1 Sheila Strøm, TBF - 920 stig
2 Rakul Mikkjalsdóttur, TBF - 800 stig

**Smádreingir:**
1 Fróði Jensen, TBF - 1160 stig
2 Gilli Sørensen, TBF - 1110 Stig
3 Hugin Albinus, TBF - 990 stig

**Gentur:**
1 Susie Midjord, TBF - 980 stig
2 Joan Thomasen, TBF - 690 stig
3 Svanna Mortensen, TBF - 388 stig

**Dreingir:**
1 Reidar Luid, Tór - 1370 stig
2 Pætur Albinus, Tór - 1190 stig
3 Sjúrður Ferjá, TBF - 1070 stig

**Kvinnuunglingar:**
1 Marin í Dali, TBF - 1200 stig
2 Mariann Mikkjalsdóttur, TBF - 820 stig
3 Eydna Jespersen, TBF - 410 stig

**Mansunglingar:**
1 Ragnar Egilsson, Tór - 1400 stig
2 Sigurð Carlsson, Tór - 1250 stig
3 Levi Winther, Tór - 740 stig

**Meistaradeildin:**
1 Petur Niclasen, Tór - 1470 stig
2 Fríði Jensen, TBF - 1420 stig
3 Vagnur Nolsøe, TBF - 1200 stig